# Reglugerð um asbest-burturkast

## 1. Heimildir

1.1. §§ 13 og 14 í kunngerð nr. 147 frá 19. Oktober 1995 um burturkast, sum seinast broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. September 2007.

1.2. "Reglugerð um skráseting og gjald fyri gjaldsskyldugt burturkast", ið er samtykt í Tórshavnar býráð 23. Februar 2012, og sett í gildi 15. Mai 2012.

1.3. "Skilhaldsreglur fyri móttøkuplássini hjá Kommunalu Brennistøðini", sum eru góðkendar í Heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar kommunu tann 3. Mars 2005.

## 2. Gildisøki

2.1. Reglugerðin umfatar burturkast, sum inniheldur asbest.

2.2. Reglugerðin ásetur skyldur fyri ruskkeldur og innlatarar, sum hava ella innlata asbest-burturkast á móttøkuplássunum hjá Kommunalu Brennistøðini hjá Tórshavnar kommunu.

2.3. Asbest-burturkast verður skilmarkað sum alt burturkast, sum inniheldur asbest ella annað tilfar, sum kann mistakast fyri at innihalda asbest, t.d. eternit. Burturkast, ið inniheldur asbest, kann t.d. vera:

- Knústar tak- og facaduplátur o.l. (eternit/asbest)
- Lofts- og veggjaplátur o.l.
- Bjálvingartilfar o.l.
- Pakkitilfar til ídnaðin o.l.
- Friktiónsbelægning o.l.

## 3. Móttøkustað:

3.1. Asbest-burturkast kann einans innlatast á Tyrvingarplássið í Húsahaganum.

## 4. Krøv til skiljing og innpakking

4.1. Asbest-burturkast skal ikki blandast við øðrum burturkasti, men skal vera hildið fyri seg.

4.2. Asbest-burturkast skal vera innpakkað ella innballað í tættan pakning, soleiðis at eingin vandi er fyri spjaðing av asbest-dusti . Hetta kann t.d. vera plastik-folia, stórsekkir ellar líknandi. Innpakkaða tilfarið skal verða sett á plattar ella líknandi, so tað kann setast av á móttøkuplássinum uttan vanda fyri dust-spjaðing.

## 5. Krøv til innlating

5.1. Asbest-burturkast skal innlatast við bilum, sum kunnu seta tilfarið av uttan at pakningurin skalast, t.d. við kranabili, gaffiltrukki ella líknandi.

## 6. Skyldur hjá ruskkelduni

6.1. Ruskkeldan hevur skyldu til kenna innihaldið í burturkastinum, herundir um burturkastið inniheldur asbest.

6.2. Ruskkeldan hevur skyldu til at innpakka asbest-burturkast sambært reglunum og upplýsa innlataranum um, at talan er um asbest-burturkast.

6.3. Ruskkeldan hevur skyldu til at boða Tyrvingarplássinum frá frammanundan, at ætlanin er at innlata asbest-burturkast.

## 7. Skyldur hjá innlataranum (bilførara)

7.1. Innlatarin (bilførarin) hevur skyldu til at hyggja eftir, um asbest-burturkast er pakkað sambært reglunum og, um asbest-burturkastið ikki er rætt pakkað, hevur bilførarin skyldu til at nokta fyri at koyra tilfarið á Tyrvingarplássið í Húsahaganum.

7.2. Innlatarin (bilførarin) hevur skyldu til at steðga við avgreiðsluna á Tyrvingarplássinum og fráboðað starvsfólkunum, at talan er um asbest-burturkast.

7.3. Innlatarin (bilførarin) hevur skyldu til at fylgja ávísunum frá starvsfólkunum um hvar og hvussu tilfarið skal avskipast.

7.4. Innlatarin hevur skyldu til at lata burturkastið skráseta sum asbest-burturkast (á vigiskipan ella í avgreiðsluni).

## 8. Burturvísing

8.1. Um krøvini í grein 4 og 5 viðvíkjandi skiljing, innpakking og innlating ikki eru hildin, kann burturkastið vísast burtur av økinum. Í hesum føri hevur innlatarin skyldu til at fara av økinum við burturkastinum.

## 9. Revsing

9.1. Brot á hesa reglugerð kann revsast sambært § 72 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. Oktober 1988 um umhvørvisvernd.

## 10. Ígildiskoma

10.1. Hendan reglugerð er samtykt í Tórshavnar býráð tann 28. Juni 2012.

10.2. Reglugerðin kemur í gildi dagin eftir at hon er kunngjørd alment.